# Føroyar fáa somu støðu sum Ísland

*Um danska stjórnin og Fólkatingið góðtaka at geva føroyingum somu skipan sum íslendingar, verður støðan hjá teimum lesandi óbroytt í mun til í dag, sigur Høgni Hoydal í svari til Heðin Mortensen*

ÓLAVUR Í BEITI

Heðin Mortensen setti Høgna Hoydal tríggjar spurningar viðvíkjandi støðu teirra lesandi í Danmark, og spyr í teim fyrru spurningunum um útbúgvingarmøguleikar hjá føroyingum í Danmark, um so er, at Føroyar verða skipaðar sum fullveldisríki, og danskan lestrarstuðul, um Føroyar verða skipaðar sum fullveldisríki, og føroyingar mistu sín ríkisborgararætt í Danmark.

Í svarinum til hesar spurningar, sigur Høgni Hoydal m.a., at um danska stjórnin og Fólkatingið góðtaka at geva føroyingum somu skipan sum íslendingar, verður støðan hjá teimum lesandi óbroytt í mun til í dag.

– Hartil er at siga, at norðurlendskur sáttmáli er gjørdur, sum tryggjar at fólk úr Danmark, Finnlandi, Íslandi, Noregi og Svøríki hava javnbjóðis atgongd til hægri lestur við lærustovnarnar hjá hvørjum øðrum. Í sáttmálanum binda partarnir seg til at tryggja øllum, sum ynskja at fara undir hægri lestur, og búgva í einum øðrum norðurlandi, javnbjóðis atgongd til hægi lærustovnarnar í teimum 5 londunum.

– Tá ríkisrættarligu viðurskiftini verða broytt, er landsstýrisins ætlan, at gerast sjálvstøðugur sáttmálapartur í øllum norðurlendskum sáttmálum, eins og at fáa sjálvstøðuga umboðan í norðurlendskum samstarvi annars. Sambært teimum upplýsingum landsstýrið hevur, er ongin forðing fyri hesum — hinvegin er tað júst fortreytin fyri at gerast javnbjóðis partur í norðurlendskum samstarvi og sáttmálum, at landið hevur fullveldi.

– Landsstýrið miðar eftir, at føroyskur lestrarstuðul verður veittur til tey, sum lesa í hinum norðurlondunum eins og uttanfyri norðurlond, og at hesin stuðul verður fult so nøktandi sum í dag, sigur Høgni Hoydal.

### Ikki beinleiðis avtalur

Viðvíkjandi triðja spurninginum, um hvussu langt landsstýrið er komið við at gera avtalur við onnur lond um samstarv á útbúgvingarøkinum, svarar Høgni Hoydal, at Landsstýrið kann ikki gera beinleiðis útbúgvingaravtalur fyri føroyskar ríkisborgarar fyrr enn fullveldi er staðfest.

– Tó er sjálvsagt nógv samstarv um útbúgvingar- og granskingarspurningar — serstakliga við hini norðurlondini. Í flestum førum er talan um ítøkiligar samstarvsavtalur millum einstøku stovnarnar, eitt nú millum Fróðskaparsetur Føroya og ymsar lærdar háskúlar í Onglandi og hinum norðurlondunum.

– Undirvísingar- og Mentamálastýrið hevur annars gjørt eina samstarvsyvirlýsing við íslendska undirvísingar- og mentamálastýrið. Henda avtala fevnir m.a. um samstarv á útbúgvingar- og granskingarøkinum. Eitt ávíst samstarv er við Ísland frammanundan, men arbeitt verður í løtuni við at fylla út karmarnar fyri samstarvinum, sigur Høgni Hoydal m.a. í svarinum.

**Lesið eisini Sosialin á Internetinum**

**www.sosialurin.fo**

# Dimmalætting og Sosialurin prenta saman

*Semja um sáttmála millum Dimmalætting og Sosialin varð fingin undir land gjáramorgunin. Avtalan hevur við sær, at Sosialurin um stutta tíð verður prentaður í litum. Ágóðin hjá Dimmalætting verður, at blaðið fær skapað fortreytir fyri betri prenting, eins og at høgligari verður at fáast við raksturin av blaðnum*

HØGNI MOHR

Dimmalætting og Sosialurin leggja prentsmiðjurnar saman. Hetta varð avgjørt gjáramorgunin.

Orsøkin til, at Sosialurin hevur valt sær aðrar prentingarumstøður, er, at prentsmiðjan hjá Sosialinum snøgt sagt er vorðin ov lítil og ótíðarhóskandi í mun til tey krøv, ið lesarar og lýsarar seta. Maskinorkan í annars væl hildnu prentsmiðjuni á Argjum er ikki nóg góð, og harumframt hevur ikki borið til at prenta blaðið í litum.

### Prentingarmiðstøðin

Her á blaðnum verður hildið, at heldur enn at gera stórar íløgur í eina nýggja prentsmiðju, skuldi blaðið royna at fáa samstarv í lag við verandi hátøkniligu prentsmiðju á Dimmalætting.

Úrslitið er, at ístaðin fyri tvær nýmótans prentsmiðjur í Havnini, verður verandi prentsmiðja á Dimmalætting broytt til eina sonevnda prentingarmiðstøð, ið skal prenta bæði Sosialin og Dimmalætting.

Orkan hjá nýggju prentingarmiðstøðini verður sera stór. Í mesta lagi hálvur fjórði tími verða nýttir til blaðprenting. Tískil verða útbyggingar framdar, so tað fer at bera til at prenta ymiskt lýsingartilfar, ið fleiri føroyskar fyritøkur nú noyðast at lata prenta uttanlands.

### Eisini útbering

Í næstum verður partafelagið, sum skal eiga prentingarmiðstøðina, stovnað. Men felagið ætlar sær ikki einans at prenta. Eisini er ætlanin at standa fyri allari útbering av Sosialinum og Dimmalætting. Í løtuni hava bløðini sjálvi skipað fyri at bera vikuskiftisbløðini út. Endamálið hjá nýggja felagnum er, at umframt útberingina av bløðunum allar útgávudagar, skal tað eisini bjóða seg fram at bera vanligt lýsingartilfar í hvørt hús.

### Byrja í juni

Hóast nýggja samstarvið, fara Dimmalætting og Sosialurin at dystast um lesarar, sum vanligt.

- Vit fara at kappast á journalistiska økinum, sigur Jonhard Hammer, marknaðarleiðari á Sosialinum.

Samstarvspartarnir eru í høvuðsheitum samdir um samstarvsháttin, men enn vantar í at gera fleiri undirsáttmálar um prentingina, sum verður gjørd í hølunum hjá Dimmalætting. Sjálvt prentingarsamstarvið fer væntandi av barkastokkum 26. juni í ár.

Sambært stjóran á Dimmalætting, Hjalgrím Samuelsen, eru fyrimunirnir hjá Dimmalætting í nýggja samstarvinum m.a., at blaðið fær rationalisera raksturin, sum hann tekur til.



- Harumframt kunnu vit við samstarvinum skapa fortreytir fyri at menna prentsmiðjuna og framleiða betur prent, sigur Hjalgrím Samuelsen við Sosialin.



# Vaktarskifti í Norðoya Sparikassa

EYDUN KLAKKSTEIN

Fríggjadagin var móttøka í Norðoya Sparikassa. Høvið var, at stjóraskiftið í sparikassanum varð markerað við eini hátíðarløtu.

Jóannes Poulsen er nú farin frá sum stjóri fyri sparikassan í Norðoyggjum, og 33 ára gamli Eyðfinn Reyðberg hevur tikið yvir á brúnni.

Nógv fólk var til móttøkuna á høvuðsskrivstovuni í Klaksvík fríggjadagin.



**Ítróttur**

e-mail: jakup@sosialurin.fo

Sosialurin - Box 76 - 110 Tórshavn - Tlf. 31 18 20 - Fax 31 47 20

**Umrøða av landskappingini hjá kvinnunum verður í mikudagsblaðnum**

# John Petersen hevur aðrar dygdir enn íslendingarnir

*Jens Martin Kundsen heldur, at møguleikarnir eru góðir at flyta spælið hjá Leiftri longri fram á vøllin, tá John Petersen er komin á liðið*



*Jens Martin Knudsen ivast ikki í, at John Petersen verður ein góður fongur hjá Leiftri*

Ein góð íbúð, ein bilur, og ein góð løn (eingin vil siga hvussu góð). Hetta er tað, sum John Petersen fær, tá hann seinni í vikuni fer til Íslands, har hann skal spæla í Leiftri saman við Jens Eriki Rasmussen og gomlu liðfeløganum í Gøtu. Sámali Joensen og spælandi venjaranum Jens Martini Knudsen.

Umstøðurnar líkjast tí, sum nógvir dreingir droyma um, at tær skulu vera hjá teimum, tá teir gerast yrkisspælarar. Onkur sigur kanska, at tað einasta, sum restar í Íslandi, er tað góða veðrið, sum er longri suðuri í Europa.

Men sambært venjaranum, Jens Martini Kundsen, kemur John Petersen yvir til fagrasta summarveður á Ólafsfirði:

– Her eru 25 hitastig, og hann sigur framvegis gott summarveður, sigur Jens Martin, sum var á veg til venjingar, tá vit á fangaðu hann í telefonini á middegi í gjár.

Og venjarin hjá Leiftri er ikki í iva um, at teir hava gjørt eitt rimmar kubb, nú teir hava fingið John Petersen í hópin:

– Øll í Føroyum vita, at John er ein fínur fótbóltsspælari, sum so at siga hevur allar tær dygdir, sum ein spælari skal hava. Men eg vil siga, at førleikarnir hjá John fara at vera uppaftur meiri týdningarmiklir fyri okkum, enn teir hava verið í Føroyum.

Hvussu tá?

– Íslendingar eru ógvuliga væl fyri, tá tað kemur til kondítión. Í so at siga øllum dystunum pakka liðini seg saman í verjuni, og so dúva tey uppá langar bóltar fram til ein ella tveir álopsspælarar. Tí er tað so ómetaliga týdningarmikið at hava spælarar frammi á vøllinum, sum eru førir fyri at halda uppá bóltin. Tað megnar John, og so er tað ein eyka styrki, at hann eisini er førur fyri at skapa sær málmøguleikar og at skora mál.

Hvar ætlar tú at brúka hann á liðnum?

– Vit spæla 4–3–3. Higartil hava vit verið noyddir at havt Sámal Joensen sum álopsspælara frammi í høgra borði. Nú fara vit at seta John Petersen í tað plássið, og so fer tað at styrkja um miðvøllin, at Sámal kemur afturat. Sámal fer at kappast við Jens Erik, ein íslending og ein brasiliumann um trý miðvallarpláss, men eg rokni ikki við, at føroyingarnir fara at smæðast burtur í tí kappingini, sigur Jens Martin Knudsen av Ólafsfirði.

Spælandi venjarin hjá Leiftri ætlar, nú John Petersen kemur til felagið, at arbeiða miðvíst við at leggja spælið um, soleiðis at teir fara at spæla minni uppá kontra og heldur fara at flyta alt fólkið longri fram.

Spenningurin er stórur á Ólafsfirði at síggja nýggja føroyingin, sum hevur spælt 25 landsdystir og sum hevur skorað eitt mál, umframt at hann hevur verið við til at vinna eitt FM heiti við B36 og trý FM heiti við GÍ.

### Gamal dreymur

Síðstu smálutirnir í avtaluni millum Leiftur og B36 komu upp á pláss í gjár. B36 fær eitt sindur av pengum fyri John Petersen. Sáttmálin, sum John hevur havt við B36, hevur verið galdandi inntil í summar. Tað vil við øðrum orðum siga, at um B36 ikki hevði viljað verið við til flytingina nú, so høvdu teir ongar pengar fingið burturúr, tá sáttmálatíðarskeiðið var farið.

John Petersen er liðugur við skúlagongdina á læraraskúlanum. Tað resta nakrar próvtøkur. Uppskriftin í tí sambandinum verður tann sama, sum hon var hjá Jens Martini Kundsen, tá hann spældi í Leiftri samstundis sum hann gekk til HF próvtøku á Kambsdali. Jens Martin fleyg heim til próvtøkurnar, og tað tóktist ikki bila, tí úrslitini vóru sera góð.

– Vit missa ein fínan spælara. Sjálvandi fara vit at sakna John, men tað hugaliga er, at higartil í ár hevur tað víst seg, at sjálvt um vit hava mist næstan eitt heilt lið av góðum spælarum, so hava vit megnað at sett okkara egnu við. Støðutalvan vísir, at higartil hevur smeiturin ikki verið meinur, sigur Kristian á Neystabø, formaður í B36.

John Petersen, sum áður hevur verið til royndarvenjingar bæði í Noregi og í Sveis, dylur ikki, at tað er ein gamal dreymur at gerast yrkisspælari. Hann segði við Rás 2 sunnukvøldið, at í Íslandi skal hann ikki gera annað enn at spæla fótbólt:

– Eg síggi soleiðis uppá tað, at tað skuldi vera nú, um tað skuldi vera, og eg eri væl nøgdur við tilboðið frá Leiftri og umstøðurnar, sum tær eru á Ólafsfirði, segði John Petersen við Rás 2 ítróttin sunnukvøldið.

Leiftur hevur tvær torførar uppgávur á skránni í teimum fyrstu umførunum í íslensku kappingini. Hósdagin skulu teir spæla á útivølli móti Akranesi við Una Arge á liðnum, og so skulu teir spæla á útivølli móti Fylkiri.

JH

# KÍ hevur álit á Sivic og spælarunum

*Nýggju jugoslavarnir koma til Klaksvíkar í dag, og í hvussu so er álopsmaðurin fer at vera við móti B68 fríggjadagin*

Svend Jacobsen, formaðurin í KÍ, var í Gøtu sunnudagin. Hann var ikki illa nøgdur við tað, sum hann sá, og úrslitið heldur hann var á góðari leið:

– Trupulleikin hjá okkum hevur verið, at vit hava ikki fingið nóg nógv burturúr á heimavøllinum. Nógv onnur ár hava vit vunnið á heimavølli móti bæði VB og NSÍ. Vit mugu bara ásanna, at í tepra tapinum á útivølli móti HB høvdu vit ikki marginalirnar við okkum. Tað høvdu vit heldur ikki á heimavølli móti VB. Dysturin í Gøtu kundi fara báðar vegir, men vanliga hava vit roknað javnleik í Gøtu sum eitt gott úrslit.

Tað hevur verið frammi, at KÍ so at siga hevur avskrivað allar vónir um at endurvinna FM heitið frá í fjør. Svend Jacobsen váttar, at FM heitið er ikki tað sum í løtuni liggur fremst í huganum, men hann vísir samstundis á, at teir framvegis kunnu missa trý stig og alíkavæl fáa somu úrtøku burturúr árinum, sum teir fingu í fjør.

– Vit hava havt fund við venjaran, Tomislav Sivic. Vit hava sagt honum, at vit eru væl nøgdir við tað arbeiðið, sum hann ger. Spælararnir eru væl nøgdir við venjingina, og eg rokni við, at úrslitini fara at koma, nú tá allir spælararnir fara at vera tøkir, og vit fáa tveir jugoslavar afturat.

Sunnudagin var Harley Bertholsen sjúkur, John Ryan, sum hevur verið skaddur, skuldi fara aftur at venja í gjárkvøldið, og Marek Wierzbicki var ikki við í Gøtu, tí hann í vikuskiftinum var heima í Póllandi.

### Jugoslavarnir koma í dag

Teir báðir so nógv umrøddu jugoslavarnir – annar er málverji og hin er álopsmaður – koma til Klaksvíkar í dag. Í gjár var ikki greitt, um teir koma undan venjingini í kvøld, men undir øllum umstøðum fara teir at venja við í morgin. Tað er altíð nakað av fólki og hyggur at venjingini hjá KÍ, og ivaleyst verður áhugin so mikið stórur næstu dagarnar, at teir áttu at umhugsað at kravt atgongugjald!

– Teir báðir jugoslavarnir skuldu koma leygardagin. Ætlanin var, at álopsmaðurin skuldi vera í hópinum. Tað hevði verið upp til venjaran at gera av, um hann skuldi vera við frá byrjan ella um hann fyrst skuldi verið á beinkinum. Eg rokni bara við, at tað fer at taka eitt sindur av tíð hjá málverjanum at venja seg við undirlagið. Í fjør sóu vit, at Stephen Boyle ta fyrstu tíðina hevði trupulleikar, tí hann bara hevði spælt á grasi. Nýggi málverjin hevur bara spælt á grasi, sigur Svend Jacobsen, formaður í KÍ.

Svend Jacobsen leggur afturat, at fyri hann var tað sera hugaligt í Gøtu at síggja, at ungu menninir, sum vóru á KÍ liðnum sunnudagin, stóðu seg stak væl. Formaðurin hugsar í hesum sambandinum um Kristian á Lakjuni, sum var á miðvøllinum alla tíðina, og um Hjalgrím Elttør, sum stóð seg væl, tá hann kom inn í álopið.

JH